ítróttur
Nr. 37 • mikudagur • 23. februar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Gunnar hevur fingið kjansin tvær ferðir

**Í fyrradagin boðaði Frem frá, at teir hava longt samstarvið við fremsta málverjan, so tað nú er galdandi til á sumri í 2007**

FØROYINGAR Í FREM
*Jóannes Hansen*

Teir tríggir føroysku spælararnir hava verið í andglettinum tvær tær síðstu ferðirnar, tá ið Frem hevur spælt venjingardystir. Í báðum førunum hava dystirnir verið spældir á graslíki í Club Danmark hallen í Ballerup.

Gunnar Nielsen, sum verður roknaður at vera næstbesti málverjin í felagnum, vardi málið bæði næstsíðsta vikuskifti, tá ið Frem vann 2-1 á Lyngby, og hann var aftur í málinum, tá ið Frem síðsta vikuskifti vann 8-1 á FC Roskilde.

Í tí fyrra førinum var Gunnar so mikið óheppin, at hann noyddist at taka seg úr stríðnum longu tá ið eitt korter var farið. Hann var skaddur, men kortini ikki verri enn so, at hann síðsta vikuskifti var førur fyri aftur at verja málið.

Jón Rói Jacobsen er fastur fúsur í Frem miðverjuni, og tað hevur hann eisini verið tvær tær seinastu ferðirnar. Jónas Þór Næs var eina løtu á vøllinum móti Lyngby. Hann varð skiftur inn, tá ið tað restaðu tíggju minuttir, og níggju minuttir seinni sá hann reytt fyri neyðbremsu.



*Føroyski málverjin, Gunnar Nielsen, hevur staðið millum stengurnar hjá Frem frá byrjan í tveimum teimum seinastu venjingardystunum.*

*savnsmynd*

Einasta málið, sum Lyngby fekk ímóti Frem, skoraði Christian Lamhauge Holst, sum áður hevur snoddað til føroyska landsliðið.

### Heldur fram

Vánirnar hjá Gunnari Nielsen at sleppa framat plássinum millum stólparnar á besta Frem liðnum eru kanska ikki tær bestu. Í hvussu so er ikki, um alt gongur, sum tað verður roknað við.

Í fyrradagin boðaði Frem frá, at teir hava skrivað nýggjan sáttmála við Jørgen Nielsen. Hann hevur áður verið á lønarlistanum í Liverpool, og í Frem siga teir seg vera ógvuliga væl nøgdar við málverjan, sum teir siga so at siga ikki ger mistøk. Hann verður sagdur at vera týdningarmikil liður í royndini hjá Frem at endurvinna pláss í superliguni.

Nýggi sáttmálin millum Jørgen Nielsen og Frem er galdandi frá 1. juli í ár og fram til 30. juni í 2007.

# Føroya Bjór Cup

**Leygardagin 19. februar 2005, skipaði Bowlinghøllin á Hálsi fyri liðkapping**

18 lið meldaðu seg til kappingina.

Kappingin byrjaði leygarmorgunin kl. 9.00 og helt áfram uttan steðg, til kl. 14.30.

Við 18 tilmeldingum, varð lagt upp til eina góða og spennandi kapping.

Og tá hugsað verður um, at tað er triðju ferð skipað verður fyri tílíkari kapping, var spennandi at síggja hvussu leikur fór, og um tað nú vóru tey somu liðini sum hórða undan.

### Kappingin var skipað sum cupkapping

Hvørt liðið hevði 3 bowlarar,og hvørt spæl var 2 seriur.

Bowlað var í trimum innleiðandi umførum, harav 12 lið komu víðari. Hesi 12 liðini kappaðust síðan í tveimum semifinalum, harav 6 lið komu víðari í finaluna.

Í finaluna hendan dagin komu, Arsenal, Pizzakjallarin, Liverpool, 3 Amicos, Real Madrid og Skemman.

**Úrslitið gjørdist:**

Nr. 1 Liverpool
Torkil, Pauli og Johan
948 stigum

Nr. 2 3 Amicos
Sunnleif, Rógvi, og Andreas 914 stigum

Nr. 3 Arsenal
Jóannes, Niels og Jens
894 stigum

Nr. 4 Skemman
Remy, Johnny, og Bárður
890 stigum

Nr. 5 Real Madrid
Kristin, Grettir, og Inga
878 stigum

Nr. 6 Pizzakjallarin
Høgni, Petur og Regin
865 stigum

Bestu seriu, gjøgnum allan dagin, hevði Johan Poulsen við 252 stigum.

Kappingin var stuðlað av Føroya Bjór.

Kappingin gekk væl og fyrireikararnir eru sera væl nøgdir við dagin.

Bowlinghøllin á Hálsi takkar øllum fyri stuðulin.




*Trý tey fremstu liðini í Føroya Bjór Cup kappingini í bowling, sum Bowlinghøllin skipaði fyri um vikuskiftið.*

# Prógv til 23 B1 venjarar

**Í næsta mánað verður skipað fyri skeiði í málmansvenjing, og tá fara báðir landsliðsmálverjarnir saman við Jógvan Martini Olsen at standa fyri**

FSF SKEIÐ
*Jóannes Hansen*

Í vikuskiftinum vórðu prógv handað teimum, sum hava luttikið í sonevnda B1 venjaraskeiðnum. Skeiðið fevnir um 40 tímar, og luttakararnir hava verið á skeiði 4. og til 6. februar og so aftur nú 19. og 20. februar. Skeiðið gevur rætt til at taka lut í B2 venjaraskeiðnum.

Luttakararnir á skeiðnum vóru hesir: HB (7) Ingi Rasmussen, Niels Pauli Jacobsen, Debes Bech, Ingolv Gunnarson, Egil D. Jacobsen, Áki Johansen og Andras K. Thomassen. EB/Streymur (5): Knút Vesturtún, Sorin Anghel, Høgni Hansen, Rólant Waag Dam og Hallur Jacobsen. LÍF (3): Magnus Skoralíð, Terji Lervig og Petur Lervig. Royn (2): Róin Schrøter og Jákup Midjord, KÍ (2): Sylvan Jacobsen og Finn Egilsson. Eyðun Dalsgarð, AB, Julian Johnsson, B68, Finnur Helmsdal, MB, og Edmund Joensen, NSÍ.

Skeiðleiðarar vóru Hans Mourits Foldbo og Eli Hentze.

Frá 11. og til 13. mars verður skipað fyri málmansvenjaraskeiði. Teir tríggir, sum fara at standa fyri tí skeiðnum, eru landsliðsmálverjararnir báðir, Jens Martin Knudsen og Jákup Mikkelsen, og so Jógvan Martin Olsen.



*Allir venjararnir, sum um vikuskiftið tóku B1-venjaraprógvið hjá FSF.*
*Mynd: www.football.fo*